## VB-Stjørnan 24-26 (13-11):

# Stjørnugull



*Dysturin er blástur av, og so tustu viðhaldsfólk hjá Stjørnuni inn á vøllin at heiðra leikarunum, sum tryggjaðu enn eitt gullmerki til Klaksvíkina*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Fyrst og fremst varð sigurin grundlagdur við einum framúr avriki í verjuni, tó at tørvurin á einum góðum málverja var sera stórur fyrstu løtuna*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Stjørnan er føroyameistari. Tær vunnu avgerandi dystin í Vági, og so kann Klaksvíkin enn einaferð fegnast um eitt gullmerki í føðingardagsárinum hjá ítróttarfelagnum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Skuldi nakar ivast, so var av álvara lagt upp til stórdyst í VB-høllini leygardagin.

Stjørnan kom á vitjan hjá lokalu hondbóltskvinnunum, og tað stóð teimum flestu greitt, at ein møguligur vinnari av hesum dystinum var føroyameistari í kvinnuhondbólti fyri 2004.

Áhugin var heldur ikki at fara skeivur. Longu væl undan dystinum strekti bilrøðin seg væl eystur móti bygdini, og í høllini var neyvan nakar sessur tøkur. Soleiðis sum høllin í Vági er háttað, við lágum lofti og nógvum metallið er heldur einki at siga til, at talan var um sannan ljóðmúr kring leikararnar, sum hitaðu upp á vøllinum.

### Lidia steðgaði VB

Og ljóðmúrurin gjørdist til eitt satt inferno, tá dysturin so varð blástur ígongd. Hetta var »brakið«, sum bíðað hevði verið eftir síðani januar mánað, og á vøllinum tóktist hvør tann einasta av leikarunum eisini at vera greið um hetta.

Intensiteturin var í toppi frá fyrsta bríksli. Í verjuni sótu kropstaklingarnar beinhart, og fyrstu gulu kortini hjá dómarunum báðum vóru skjótt uppbrúkt, tó at talan ikki var um nakran form fyri óreinum spæli.

Og á vøllinum var tað VB, sum legði betri út. Kanska var ætlanin at endurtaka fyrstu minuttirnar frá steypafinaluni, tá tær vunnu sær eina at síggja til trygga leiðslu, og tað var sum so eisini um reppið at eydnast hjá teimum. Men Stjørnan hevði Lidiu Vladic í málinum. Fyrstu fimm minuttirnar tók hon sær av trimum skotroyndum frá leysum vágbingum, umframt at hon eisini lúrdi Aukse Vysniaskaite av í eini brotskastsroynd, og so líðandi kom Stjørnan eisini inn í dystin.

Takið í høllini mundi tó fara uppfrá, tá Stjørnan eftir tíggju minuttum varð rakt av eini dupult-útvísing. VB nýtti høvið til at vinna seg upp á 6-4, og hetta var nakað, sum Stjørnan ongantíð vann aftur fyri steðgin.

Ikki tí. Í verjuni tóktust gestirnir nú at liva fult upp til málsetningin um at steðga teimum báðum útlendsku stórskjúttunum hjá VB. Ikki minst varð Aukse tacklað alt fyri eitt, tær ferðirnar hon gjørdi seg til at skjóta.

Men VB verjan var tó heldur ikki fyri ongum. Í longum løtum sum 5-1, har bak-ketan hjá Stjørnuni alla tíðina varð órógvað, og tó at hendan kom betri við, tá farið varð aftur í 6-0, so tóktist tað vera VB, sum hevði takið.

### Eingi kontra

Seinnu árini hava eyðkennini hjá VB og Stjørnuni millum annað verið, at bæði liðini hava dugað sera væl at fingið kontra-spælið at koyra. Tað hevur ofta givið útslag í nøkrum sera undirhaldandi og ferðmiklum dystum millum feløgini, men soleiðis varð tó ikki hesaferð.

Undirhald og ferð var tó nóg mikið av, men kontraspælið var mest sum ikki til. Bæði tí leikarar vóru ov varnar við at renna avstað, tá mótstøðan royndi seg við skoti, men so sanniliga eisini tí denturin á retur-renningarnar var ovurstórur.

### Svørt VB-løta

Tí vóru tað onnur vápn, sum skuldu nýtast, og frá byrjan av seinna hálvleiki fór Stjørnan eisini undir at nýta eitt av hesum.

Við eini 5-1 verju, sum í stóran mun minti um mansverju av Daivu, royndu gestirnir at seta kílar í álopsspælið hjá VB, og spakuliga tóktist yvirvágin koppa til fyrmuns til gestirnar.

Enn var tað tó VB, sum hevði munin á máltalvuni. Tær megnaðu alla tíðina at svara næsku gestunum aftur, og tíggju minuttir inni í hálvleikinum fingu tær møguleikan at skræða seg leysar. Við 18-16 á talvuni



fekk Anna Kristina Samson hjá Stjørnuni tveir fingrar frá dómarunum. Júst tað, sum Stjørnan ikki hevði tørv á, nú tær framvegis vóru aftanfyri, men VB megnaði ongan tíð at gera sær dælt av hesum.

Tvørtur ímóti, so var tað Stjørnan, sum fekk tey bæði næstu málini, og at tað var dyggur smeitur hjá VB, var sjónligt.

Luftin tóktist mest sum fara úr leikarunum, og hóast tær enn einaferð megnaðu at leggja seg á odda, so setti Stjørnan nú av álvara trumf á. Ikki minst gjørdi tað góðan mun, tá Katarina Stepanov aftur kom inn á vøllin, eftir at hon hevði hvílt seg síðani einaferð í fyrra hálvleiki. Við einum lámi á bakkinum kom brádliga nógv størri breidd í spælið hjá Stjørnuni, og so opnaði VB-verjan seg av álvara. Alina Olaru og Katarina sjálv sluppu ferð eftir ferð heilt inn at verjuni, áðrenn tær loystu hoppskotini av, og sjálvt um VB framvegis helt stutt tjóður í, so tóktist dysturin hava funnið sína avgerð.

### Stjørnuløtan

Og staðfestingin av hesari kom seinastu fýra-fimm minuttirnar. Fyrst fór Joan M. Djordjevic við eini framúr fótfintu ígjøgnum VB-verjuna, og tá Anna Kristina so varð tikin í gjøgnumbrotsroynd av veinginum, sá svart út hjá VB. Talvan vísti 23-25 í málum og 28.43 í tíð, tá Alina Olaru fór fram at skjóta brotskastið. Flestu áskoðararnir mundu halda ondini, tá rumenski leikarin riggaði til, og suffið frá mongu vágbingunum og fagnaðurin hjá klaksvíkingunum, sum vóru komnir suður, segði nokk tað mesta. Meistaraheitið var avgjørt, og tó at VB við at fara heilt út til mótstøðuna seinastu løtuna fekk skapt nakað av órógv, so var ivin burtur. Ikki minst tí VB heldur ikki kundi nýta ein javnleik til nakað sum helst, uttan at útseta pínuna í eina viku. Stjørnan átti dagin og meistaraheitið, og tá seinasta brísklið hevði ljóðað, tustu áskoðarar inn á vøllin, meðan VB-leikararnir niðurbrotnar fóru av vøllinum. Tær høvdu givið alt, og móti einum hvørjum øðrum liði í landinum hevði hetta helst eisini verið nóg mikið. Men ikki hesaferð. Tær hittu her besta kvinnuliðið í landinum, og mugu tær nú lata steypið frá sær.

### Uppiborið meistaraheiti

Og skal takast samanum, so má eisini sigast, at meistaraheitið er uppiborið hjá klaksvíkskvinnunum. Sjálvandi fyrst og fremst tí tær eru liðið, sum hevur flestu stigini, men eisini tí tær tykjast vera liðið, sum hevur flestu og størstu dygdirnar.

Ikki minst sýndu tær hesaferð, at tær megna at halda fast um taktiska uppleggið til eina uppgávu. Her var stóru dentur lagdur á at steðga báðum útlendingunum hjá VB, og sera konsentrerað og effektivt varð hendan uppgávan eisini loyst.

Og við eini bak-ketu, sum helst er tann sterkasta í landinum saman við tveimum av skjótastu vong-spælararunum, er fundamentið fyri góðum álopsspæli so sanniliga eisini lagt. Ikki minst hevur liðið her eisini havt fleiri streingir at spæla uppá, eftir at Alina Olaru í vetur varð knýtt at felagnum. Málverja-plássði tóktist kanska fyrstu umførini ikki at vera tað sterkasta, men so hvørt sum Lidia Vladic og verjan lærdu hvønn annan at kenna, batnaði hetta, og at sjálvsálitið hjá málverjanum eisini øktist av hesum, var dysturin í Vági eitt framúr dømi um.

Afturat hesum – fyri tað mesta royndu – leikarunum, hevur Stjørnan so eisini nakrar leikarar, sum komandi árini kunnu seta dám á kappingina. Leygardagin stóð helst ov nógv upp á spæl, til at venjari tordi at tveita tær inn, men við miðvísari ætlan og innslúsan hesum viðvíkjandi, er væl hugsandi, at Stjørnan eisini tey komandi árini fer at halda til í oddinum av føroyskum kvinnuhondbólti.

### Dysturin í tølum

**VB-Stjørnan 24-26 (13-11)**
**Málskjúttar**
**VB:** Daiva Toumaite 8(3), Gurið Mortensen 5, Aukse Vysniaskaite 3, Laila Jespersen 3, Rannvá Augustinussen 3, Margreth Augustinussen 2
**Stjørnan:** Alina Olaru 9(2), Joan M. Djordjevic 5(2), Una Olsen 4, Anna Kristina Samson 3, Katarina Stepanov 3, Annika Ljósstein 1, Bára S. Klakstein 1
**Brotskøst:** VB 6, Stjørnan 6
**Útvísingar:** VB 1, Stjørnan 6
**Dómarar úr Neistanum/-Kyndli:** Kristian Johansen & Gunnar Gregoriussen.

Lótu seg als ikki ávirka av umstøðunum, men hildu fast og róliga um eina greiða linju allan dystin á tamb.


WWW.SMYRIL-LINE.COM




BERGEN-CRUISE



**BERGEN** – býurin millum tey sjey fjøllini. Lítandi oman yvir býin frá fjallinum Fløjen, spákandi niðri á bryggjuni fram við gomlu litríku timburhúsunum, ella hvar vit enn eru, so er Bergen ein sera vakur og hugtakandi býur. Havið hevur í øldir knýtt býin til umheimin og gjørt Bergen til ein miðdepil fyri samhandil og mentan.

Fyri hvønn 1.260,-

**Íroknað prísin er:** Ferðin fram og aftur við Norrönu í 4 koyggjukamari innan við wc/bað. Hartil 2 nætur á hotelli í Bergen í dupultkamari við wc/bað.

Eykaprísur er fyri onnur kamarsløg





Mini-Cruise úr 600,-

HETLAND-CRUISE



MINI-CRUISE

**Loyv tær eina hugnaliga Mini-Cruise ferð við Norrönu**

**Prísirnir eru hesir:**

| | | |
|---|---|---|
| 4-koyggjukamar við wc/bað, innv. | kr. | 600,- |
| 4-koyggjukamar við wc/bað, útv. | kr. | 700,- |
| 3-koyggjukamar við wc/bað, innv | kr. | 800,- |
| 3-koyggjukamar við wc/bað, útv. | kr. | 900,- |
| 2-koyggjukamar við wc/bað, útv. | kr. | 1000,- |

Prísurin fatar um ferð fram og aftur á farleiðini Tórshavn-Hanstholm, Tórshavn-Bergen ella Tórshavn-Seyðisfjörður (matur og drykkjuvørur ikki íroknað).

Góð orkestur luttaka á øllum cruise-ferðum.

Ferðirnar eru galdandi restina av vetrarsiglingarskeiðnum, t.v.s. til 29. apríl.

Farið verður av Havnini hóskvøld og komið verður til Lerwick fríggjamorgun kl 8.30. Í Hetlandi hevur tú uml. 2½ dag at hugna tær í. Farið verður avstað aftur sunnukvøld og komið verður á Havnina mánamorgun kl. 6.00.

Í Hetlandi er vøkur náttúra og hópin av áhugaverdum støðum at vitja.

Fyri hvønn 1.500,-

**Íroknað prísin er:** Ferðin fram og aftur við Norrönu í 4 koyggjukamari innan við wc/bað. Hartil 2 nætur á hotelli í Hetlandi í dupultkamari við morgunmati.

Eykaprísur er fyri onnur kamarsløg

J. Broncks gøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo



10 pers. Land Cruiser til sølu



Væl útgjørdur Toyota Land Cruiser VX100 LE, 4.2 litur 6 syl. umleið 240 hk, skrásettur sum 10 pers.bussur, til sølu.

Bilurin er frá juli 2001 og hevur koyrt 50.000 km.

Hann hevur alla hugsandi útgerð sum t.d. el-drivin leðursetur við hita, klimaanlegg, luftfjaðrar, multi CD-anlegg, alu-felgur o.s.fr.

**Til sølu um hóskandi boð fæst**

Sp/f VR-bilar • Hoyvíksvegur 61
P.O. Box 3130 • FO-110 Tórshavn
Tel 322 110 • Fax 322 111